

# Peruanska sálin í fótbólti

*Bogi Eliasen*
*Stjórnmálafrøðingur og fótbóltselskari*



Tá fólk sum eg fáa naskar spurningar um hví vit brúka tíð uppá at hyggja at fótbólti, eitt tápuligt spæl sum fær 22 einstaklingar at renna eftir einum bólti, ja so roynir ein at verja seg við, at fótbóltur onkursvegna ímyndar lívið. Í einari samfelagsmeting er tað lítið hóskandi at taka støði í fótbóltsdystum, ella er tað?

Sum í flestu suðuramerikonskum londum eru peruanar garvillir í fótbólti. Nógv verður kjakast um fótbólt, og serliga mennirnir spæla nógv fótbólt í frítíðini. Hóast hetta er triðja ferðin hjá mær í Peru, er hetta fyrsta ferðin eg havi verið til fótbóltsdyst. Í Arequipa, næststørsta býnum, sum ikki hevur vunnið meistaraheitið síðan fyrst í áttatiárunum, eru tvey fyrstudeildarfeløg, Atletico Universitarío, sum ikki hevur serliga nógv viðhaldsfólk, og Melgar, ið er hjartafelagið hjá býnum. Fyrsti dysturin eg sá, var millum Atletico og Allianza Lima. Atletico hevur heimavøll á tí stóra stadion í býnum, sum rúmar einar 50.000 áskoðarar og har fleiri dystir blivu leiktir í Copa America fyri tveimum árum síðan. Tað vóru tó neyvan meira enn 5000 áskoðarar til henda dystin.

## Landafrøðin

Landafrøðin í Peru hevur stóra ávirkan á fótbóltin. Arequipa liggur í 2350 metra hædd, so roknast kann við at leikarar úr t.d. Lima, sum liggur í sjóhædd, møðast skjótari. Heimaliðið, sum lá triðniðast spældi eisini betur og hevði nakrar risamøguleikar, men bólturin vildi ikki inn. Dysturin annars var merktur av nógvum flottum tekniskum detaljum, sum vit sjálvdan síggja í Norðurevropa, men samstundis eisini av sera vánaligum taktiskum innliti. Tað sást týðiliga at taktisk venjing ikki verður raðfest og at plássið á vøllinum bleiv illa gagnnýtt. Eitt annað er sjónleikurin, at fara um koll við hvørt lítið skump og síggja út sum deyðin er í hølunum. Suðuramerikanskur fótbóltur er í heila tikið merktur av nógvum fríspørkum, og at kortini ikki fella so lætt sum í Evropa. Í hesum dystinum kom ikki samanhangur í spælið, tí tað var fríspark alla tíðina. Aftur til dystin. Hálvleiksstøðan var 0-0 og beinanvegin tá seinni hálvleikur fór í gongd, sást at spælararnir úr Lima vóru lúgvaðir, men tað tyktikt ikki sum at heimaliðið Atletico Universitario, rættiliga kundi taka sær um reiggj, teir bardust ov lítið, offraðu seg ikki og so skoraði mótstøðuliðið.

Atletico hevði hetta kappingarárið satsað, og keypt eitt sterkt lið, men samanhangarur hevur ongantíð verið í spælinum. Tað sum her verður nevnt "Amor a la camisa" kærleiki til troyggjuna sum merkir at offra seg fyri felagnum, var ikki at hóma á hesum liði.

## Bartrogið dómarin

Eitt annað merkisvert er málbrúkið frá áskoðarunum mótið dómaranum Eg lærdi fleiri nýggj ókvæmisorð á sponskum hesa løtuna. Virðingin fyri dómaranum er null, hann er heilt einfalt eitt bartrog. Dómaratrioðin fær eisini politiverju, tá hon kemur og fer á vøllin. Mitt í hesum dystinum fekk dómarin eina plastfløsku í høvdið, sum ein áskoðarin grýtti eftir honum. So byrjaði ein typisk suðuramerikonsk tilgongd. Sum alla aðrastaðni fer dómarin yvir til 4. dómaran og boðar frá tilburðinum, hann heitir síðan á stadionfrásøgumannin um at boða áskoðarunum frá, at slíkt óreglusemi ikki ber til, og at fólk skulu sissa seg. Roknaði við, at stutt og strang boð fóru at koma úr hátalaranum. Í staðin bleiv ein lógartekstur um reglugerðir á stadion lisin upp í einar tríggjar minuttir. Hvør lurtar eftir einum lógarteksti mitt í einum fótbóltsdysti?

## Fólksins lið

Seinna dystin eg sá, var millum annað oddaliðið Cienciano úr Cuzco, sum vann Copa Sudamerica í fjør, sum kann samanlíknast við UEFA Cup kappingina í Evropa. Hesin sigur var við til at geva peruanskum fóbólti eitt veruligt sjálvsálitsskump. Cien-